## Krzysztof mist takið

Aarhur Fremad tapti aftur hetta vikuskiftið í 2. deild vestur, og nú mál felagið helst uppgeva dreymin um uppflyting. Aarhus Fremad byrjaði annars seinnu hálvu av kappingini væl, men nú er liðið hjá Krzystof Popczynski mest sum steðgað upp. Hesaferð spældi Fremad lokaldyst ímóti Skovbakken og tapti 2-1.



## Agger vil ikki leingja

Sambært bretska blaðnum News of the World hevur danski verjuspælarin Daniel Agger havnað einum tilboði frá Liverpool um at leingja sáttmálan. Liverpool ætlaði at lata Agger 80 milliónir krónur fyri næstu fýra árini, men Agger hevur sagt nei takk. Áhaldandi slatursøgur hava sett Agger í samband við italsku felgøini AC Milan og Juventus.

# Bogaskjúttarnir klárir til Oyggjaleikir

**12 bogaskjúttar, ein dómari og tveir hjálparar. Hetta verður fólkið úr Føroyum, ið verður at finna á bogaskjótivøllinum á Álandi**

BOGASKJÓTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Absalon Hansen, Hans Petur Højgaard, Eirikur í Jákupsstovu, Jógvan Magnus Andreasen, Annika Vang, Jastrid Jensen, Jógvan Niclasen, Albert Dam, Hans Asbjørn Eysturdal Magnus Andreassen, Sigrid Vang og Rakul Dam skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum í summar.

Hetta varð flaggdagin endaliga avgjørt, tá seinasta úttøkukappingin var á Toftum.

Í recurvebólkinum var tað mesta nærum greitt frammanundan, tí eitt sindur av muni var millum fýra teir bestu og hinar gjøgnum kappingarnar í høvdu verið frammanundan.

### Kappaðust um trý mál

Hinvegin var stórur spenningur kring Comoundliðið, tí har vóru einir seks skjúttar, ið kappaðust um trý pláss. Jógvan Niclasen var nærum tryggjaður frammanundan, men púra opið var kring hini plássini.

Endin varð, at Albert Dam, Hans Asbjørn Eysturdal og Magnus Andreassen tóku hesi pláss, og til dømis Per Holm Andersen, ið hevur vunnið nógv heiðursmerki fyri Føroyar, megnaði ikki at koma við á liðið.

Útav næstan 2500 stigum, var Magnus Andreassen bara 12 stig frammanfyri Nikkel Petersen, ið var næstur á listanum. So sigast kann, at framtíðin er rættiliga áhugaverd í bogaskjótingini.

### Sigrid er aftur við

Sigrid Vang kunngjørdi til seinastu Oyggjaleikir, at tað vóru hennara seinastu og hevur leingi tosað um, at hon ikki fór við til oyggjaleikirnar.

Nú ætli eg mær at vera áskoðari, og um brúk er fyri einum hjálpara, so hjálpari hjá øllum tykkum, segði hon eftir kappingina skírisdag, men nú hevur hon drigið í land.

- Aja, eg komi bara við, segði hon leygardagin, tá endaligt svar skuldi gevast. So tað er møguleiki fyri, at hon vinnur enn fleiri heiðursmerki.

Tó verður Per Holm Andersen á Oyggjaleikunum, tí bogaskjótideildin hevur avgjørt at nýta hann og hansara nógvu royndir, sum hjálpara á ferðini. Per Holm Andersen verður eisini liðleiðari á ferðini.

Somuleiðis verður Torfinn Hansen við sum hjálpari.

Seinasta fólkið, ið verður við í ferðalagnum hjá bogaskjúttunum er Schandorff Vang. Hann verður við sum dómari í kappingini, nú hann hevur valt at gevast við skjótingini á Oggjaleikunum.




*Hóast Sigrid Vang, eftir kappingina á Rodos boðaði frá, at tað vóru hennara seinastu oyggjaleiki, so hevur hon avgjørt at luttaka hesaferð eisini*

## Áland fyri framman



**Oyggjaleikirnir eru framvegis eitt tað besta høvið hjá føroyskum ítróttarfólkum at styrkismeta seg**

ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um knappar tveir mánaðir verður enn av útgáva av oyggjaleikum sett.

Summar røddir hava ført fram, at leikirnir ikki longu eru tað, sum skal til, um føroyskur ítróttur skal mennast. Og hyggur tú at fremstu ítróttarfólkum okkara, so er kanska rætt, at støðið á oyggjaleikum er lægri enn tað, sum tey dystast við í øðrum altjóða kappingum.

Men sum lopfjøl og mátistokkur eru leikirnir framvegis júst tað, sum størsti parturin av føroyskum ítrótti hevur tørv á. Fram um alt, so hava oyggjaleikir støðugt verið ein av heilt stóri motivatiónsfaktorunum hjá ítróttarfólkum okkara, og í so máta hava leikirnir støðugt verið við til at skapa framdrift og menning í føroyskum ítrótti.

Og tað er soleiðis fyrst og fremst leikunum at takka, at vit í dag eiga ítróttarfólk, sum kanska ikki møta teimum risa-stóru avbjóðingunum á leikunum men ístaðin hava sett sær nýggj og størri mál.

Og tá tað er sagt, so er tað framvegis gleðiligt, at fremstu einstaklingar okkara framvegis síggja tað sum stuttliga og spennandi avbjóðing at taka lut á leikunum. Kanska eisini tí leikirnir eisini í stóran mun innihalda menninskjansligar upplivingar, har vinarbond verða knýtt, og har tað – hóast stóra kappingarelementið – eisini ræður um at skapa framburð og menning heldur enn at tað bara skal vinnast fyri ein og hvønn prís.

Her heima verða seinastu úttøkunar á ymsu landsliðunum framdar í hesum døgum, og hjá teimum, sum skulu taka lut, fara næstu mánaðirnir í stóran mun at snúgva seg um fyrireiking til stóru avbjóðingina, soleiðis at toppurin verður raktur júst ta vikuna, sum leikirnir eru. Um gullregnið verður tað sama, sum tað var á Rhodos, er so ein annar spurningur. Men í metrum, sekundum og øðrum eindum er talan um mátistokkin, har fram- ella afturgongd hjá ymisku kappingargreinunum verður vektað.